## HEILSANIR



**Góði Høgni**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Nú er tú ein stórur drongur.
**Ynskja omma og abbi xxx**



**Allarbesti Hjørtur**
Omma og abbi ynskja tær hjartaliga tillukku við føðingardegnum.



**Góða elskaða lítla Katrin**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag, tann 17. mai. Vit elska teg soooo nógv.
**Heilsan mamma, pabba, Benjamin, Eyðhild og Helena**



**Góði fitti stóribeiggi**
Hjartaliga tillukku við 10 ára degnum.
**Ynskir Ari xxx**



**Góða fitta Katrin**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum tann 17. mai. Gud signi framtíð tína.
**Ynskir abbin í Danmark**



**Góði beiggi**
Hjartaliga tillukku við 24 ára degnum 16. mai. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskir lítla didda**


**FØROYA KOLVETNI**
Partabrøv í Føroya Kolvetni ynskjast til keyps.
*gasco@mail.com*

**ÍSLAND-FØROYAR**
Nú eru fá pláss eftir til túrin hjá 12. manni til Reykjavíkar 5.-8. juni. Ring og hoyr meira. www.footballsupporters.fo
*12. maður tlf. 213212*

**GRUNDSTYKKI Í SØRVÁGI**
Fæst hóskandi boð, er eitt stórt grundstykki í Sørvági við góðum útsýni til sølu.
*Tlf. 332105*

**FØROYSKAR BROTFLÍSAR**
Hevur nakar nakrar fáar stórar føroyskar brotflísar at selja mær.
*Tlf. 217330 ella 317330*

**MODELFLÚGVARI TIL SØLU**
við øllum, sær gott út og hevur flogið 2 ferðir. Alt riggar sum tað skal. Prísur 5.500,-
*Tlf. 226880*

**STUNT RULLUSKOYTUR**
merki Bauer str. 42 1/2, hjól stødd 56/88 ABEC 3. Rollerblade trygdarútstýr fylgir við. 1350,- kr.
*Tlf. 264421*

**TIL SØLU**
Junior Golfsett til sølu.
*Tlf. 229999*

**MYNDATÓL TIL SØLU**
1 1/2 ára gamal Minolta Dynax 505si kassi til sølu fyri 1.800 kr. 1 ára gamalt Minolta 3500 xi blitz til sølu fyri 1.500 kr. 1 ára gomul Tamron 28-300 mm. aspherisk linsa. til sølu fyri 5.000 kr. Samlað til sølu fyri einans 7.500 kr., nýprísur 13.000 kr.
*Tlf. 260590*

**FARTELEFON TIL SØLU**
Nokia 3330 til sølu fyri 600,-
*Tlf. 316249*

**UM HÓSKANDI BOÐ**
er frímerki stemplað 1907 til sølu.
*Tlf. 255584*

**TIL SØLU**
Óbrúkt H-vindeyga frá Vatnsoyra snikkaravirki við kunstigum sprossum – stødd 80 x 120 1500 kr.
*Tlf. 221369*

**VINDEYGA**
Vegna skeivt mát er eitt spildurnýtt vindeyga til sølu. Stødd 100 x 70 frá Føroya Glugga, matt glas.
*Tlf. 333542*

**NOKIA 3310**
fartelefon við tekniprogramm og tastaturlás til sølu fyri 600 kr.
*Tlf. 321176, Páll*

**FERÐ FYRI TVEY**
við Norrønu til Bergen fram og aftur. Gist í 4 koyggjukamari v/ wc og bað, til sølu við avsláttri.
*Tlf. 313913*

**PARABOL MÓTTAKARI**
Analogur parabol móttakari við skál (1m) bíliga til sølu.
*Tlf. 449960 & 252396*

**ORANGE SPV**
Orange SPV, farveskærm, PDA-funkt., MP-3, SD kortlæser, kamera, mm. Som ny da den er meget lidt brugt. Pris: 3400 kr. Pris er inklusiv fragt. Ring +4526744708 el. skriv til f_von_barnekow@hotmail.com. Andre mobiler haves også.
*Ring +45 26744708*

**TIL SØLU**
2 st. Seng lamper furu 300 kr. Dubbel seng i furu 2 x 80 br. 2 m lång ej madrass 400 kr. Hvit sengbord 100 kr. Nyggja Badrumskåp brun 200 kr. Coca cola skylt med lysrør kompl. endast 400 kr. Sengtäppe hög kvalitet 30 kr. Nyggja golvtäppe 8 kvm. 50x50 platter Antracitgrå farve 200 kr.
*Tlf. 268607*

**MODELBÁTUR**
Ein modelbátur AWI 33 við fjarstýring til sølu.
*Tlf. 310144*

**WC-KUMMA TIL SØLU**
Lítið brúkt wc-kunna til sølu vegna umbygging.
*Tlf. 229510 ella 218890*

**IFÖ-VASK TIL SØLU**
Brúkt vask v/ krana til sølu vegna umbygging.
*Tl. 229510 ella 218890*

**BÍLIG FARTELEFON!**
Ericsson T66. Heimsins minsta fartelefon vigar einans 59 g, er lítið brúkt og vælhildin. prísur 1000.- kr.
*Tlf. 504840*

**YNSKIST TIL ROSS**
Selatoy til íslandsross til at sleipa vogn ella at draga við, ynskist til keyps. Má vera í rímuligum standi og ikki ov dýrt.
*Tlf. 220043 eftir kl. 16*

**CAMPINGVOGNUR TIL SØLU**
Campingvognur frá 1988 í góðum standi til sølu.
*Tlf. 422228 ella 251162*

**MARKNAÐARDAGUR**
í Sjónleikarhúsinum verður 24. mai. Hava tit okkurt at lata okkum fáa, ber til at koma í Sjónleikarhúsið 17. mai kl. 13-17.
*Sjónleikarhúsið*

**PLANTUR TIL SØLU**
Staudir, steinplantur, bertrø, jarberplantur og trø, íð øll hóskar sera væl til tað føroyska verðurlagið.
*Tlf. 448271*

**NOKIA 3330**
lítið brúkt til sølu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 319030*


**Heilsanir** — 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mið-degi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.........................................................................
.........................................................................
.........................................................................
.........................................................................
.........................................................................
.........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .........................................................................
Bústaður: .........................................................................
Bygd/býur: ..................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



## UTTAN ÚR HEIMI

### Máttu sløkkja reaktor

Russar fingu sunnudagin trupulleikar við einum reaktori á kjarnorkuverkinum á Kolanesinum, og trupulleikarnir gjørdu, at reaktorurin mátti sløkkjast.

Norsku stráluverndarmyndugleikarnir fingu boð um trupulleikarnar, og teir hava eisini fingið at vita síðani, at brekið við reaktorinum er umvælt. Sum skilst eydnaðist tað russum at sløkkja reaktorin við teirri sjálvvirkandi trygdarskipanini.

Norsku myndugleikarnir siga, at eingin geiðslavirkin dálking er staðfest aftan á óhappið, og vandi er heldur ikki fyri dálking, sigur stjórin hjá stráluverndarstovninum, Ole Harbitz, við Aftenposten.

### Nýggja leiðslu

Fleiri av leiðarunum hjá palestinsku trygdarmyndugleikunum fingu sekkin mánakvøldið, og løtu seinni tilnevndi Mahmoud Abbas, forsætisráðharri, aðrar menn í teirra stað.

Hildið verður, at leiðslubroytingin hevur samband við tær nógvu palestinsku sjálvmorðsbumbuatsóknirnar í Ísrael seinastu dagarnar. Teir palestinsku sjálvstýrismyndugleikarnir hava sýtt fyri at átaka sær ábyrgdina av atsóknunum, men hava kortini lovað at gera alt, sum stendur í teirra makt, fyri at avmarka harðskapin. Leiðsluskiftið í trygdartænastunum er helst ein liður í hesum.

ST hevur eisini kravt, at palestinsku myndugleikarnir skulu taka neyðug stig fyri at steðga sjálvmorðsatsóknunum. ST-diplomatar ivast ikki í, at víðgongdir felagsskapir skipa fyri atsóknunum við tí endamáli at forða fyri, at friðartilgongdin millum Ísrael og palestinar verður tikin uppaftur. Norski ST-umboðsmaðurin í Miðeystri, Terje Rød-Larsen, segði í gjár, at yvirgangur eigur ikki at sleppa at taka friðartilgongdina til gísla.

### Líkjast meira okkum

DNA-kanningar vísa nú, at sjimpansur líkjast meiri fólki enn øðrum apum. Sambært kanningunum hava sjimpansur 99,4 prosent av teimum arvaeginleikunum, sum fólk hava.

Niðurstøðan hjá granskarunum er, at í veruleikanum eiga sjimpansurnar at verða bólkaðar í bólkin "homo". Sum er umfatar hesin bólkurin bara fólk, men tað er ikki rætt, siga granskararnir á lærda háskúlanum Wayne í USA. Teir hava eisini granskað gorillur, orangotangur og mýs, men einki av hesum vísti seg at hava so mikið av arvaeginleikunum hjá fólki, at tað ber til at skráseta tey í sama bólk sum okkum.

Vísindafólk siga, at amerikansku kanningarnar tykjast vátta ástøðið um, at menniskjan og sjimpansan hava sama upprunafaðir, sum gekk á Jørðini fyri millum fimm og seks milliónum árum síðani.

### Kakerlakkar sum húsdjór

Summi vilja hava ein hund, onnur eina kettu og uppaftur onnur eitt ross sum húsdjór, men nú hevur ein avstralskur djórahandilsmaður funnið upp á nakað nýtt.

John Olive sigur, at kakerlakkar eru góðir vinir, lættir at hava við at gera, og so taka teir lítið pláss. Hann vil vera við, at børnini kunnu spæla við teir uttan at stúra fyri at verða bitin.

Avstraliumenn, sum vita eitt sindur um kakerlakkar, vísa seg at vera kræsnir, sigur John Olive. Teir vilja ikki hava teir vanligu kakerlakkarnar, men tvey sløg, sum halda til í landspartinum Queensland í útnyrðingspartinum av Avstralia. Hesir kakerlakkarnir eru einar átta sentimetrar til longdar og viga eini 35 gram. Og so liva teir eini tíggju ár, sigur John Olive.

# Óvanliga nógvar ódnir í Atlantshavinum í ár

**Amerikanskir veðurfrøðingar siga, at óvanliga nógvar ódnir fara at herja yvir Atlantshavinum í ár**

VEÐUR
*Árni Joensen*

Veðurfrøðingarnir á amerikanska veðurstovninum í Miami vænta, at millum 11 og 15 tropiskir stormar fara at gera um seg yvir Atlantshavinum í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 30. november í ár, og at millum seks og níggju teirra fara at menna seg til veruligar ódnir. Tvær av hesum ódnunum verða eftir øllum at døma ógvusligar. Tað merkir, at vindferðin verður minst 178 kilometrar um tíman.

Vanliga eru níggju tropiskir stormar yvir Atlantshavinum um árið. Seks teirra plaga at menna seg til ódn, og tvær teirra plaga at vera serliga ringar. Men her verður ein broyting í ár, siga amerikansku veðurfrøðingarnir, og teir hava eisini eitt boð uppá, hví so er.

Tað eru tvinnar orsøkir, siga teir. Onnur er, at tað serliga veðurfyribrigdið við veksandi hita í Kyrrahavinum, El Nino, viknar. Ístaðin fáa vit tað, sum veðurmenninir rópa El Nina, sum elvir til fleiri stormar og ódnir. Hin orsøkin er, at sjógvurin har á leiðini er heitari enn vanligt.

Hagtøl hjá amerikanska veðurstovninum vísa, at talið á tropiskum stormum og ódnum er vaksið munandi síðani 1995.

### Seinasta myndin

*Hendan myndin er eftir øllum at døma tann seinasta, sum varð tikin av enska ferðamannaskipinum "Titanic", áðrenn tað sakk. Myndin er tikin, tá skipið fór úr Queenstown á sína fyrstu og einastu ferð um Atlantshavið. Myndin verður seld á uppboði í London í dag og er mett at fara at geva eigaranum einar 170.000 krónur.*



# Apartheid-offur krevja endurgjald

**Fólk, sum vóru offur fyri harðrenda apartheid-stýrinum í Suðurafrika, krevja nú fleiri milliardir dollarar í endurgjaldi. Og tey hava fingið sær ein kendan, men umstríddan sakførara**

APARTHEID
*Árni Joensen*

Í gjár fór sakførarin Ed Fagan í rættin við einum kravi um, at svørt, sum liðu undir tí harðrenda apartheid-stýrinum í Suðurafrika, skulu hava fleiri milliardir dollarar í endurgjaldi.

ED fagan hevur roynt seg við endurgjaldskrøvum fyrr. Tað var hann, sum fekk sveitsiskar bankar at rinda eina milliard dollarar í endurgjaldi fyri jødar, sum vórðu týdnir undir seinna heimsbardaga. Tá legði hann eisini sak ímóti nøkrum av teimum størstu ídnaðarfyritøkunum, sum noyddust at rinda teimum avvarandi stórt endurgjald.

Hesaferð sigur Ed Fagan, at hann er sakførari hjá einum hópi av svørtum, sum liðu undir apartheid-stýrinum. Kravið er ikki vent ímóti núverandi myndugleikunum í Suðurafrika, men heldur 34 altjóða fyritøkum, sum sambært sakføraranum gjørdu sær dælt av táverandi lóggávuni í Suðurafrika. Millum tær 34 fyritøkurnar eru DaimlerChrysler og USB and Credit Suisse.

Stjórnin í Suðurafrika stuðlar ikki Ed Fagan, men tað ger tann kendi suðurafrikanski erkabiskuppurin Desmond Tutu. Ed Fagan hevur funnist at stjórnini, tí hon eftir hansara tykki hevur gjørt alt ov lítið fyri at verja rættindini hjá ofrunum undir gamla apartheid-stýrinum.